Varðagøta 12 · FO-100 Tórshavn
Tlf. 31 28 54 · Fax 31 69 90
www.123hjemmeside.dk/sankta_josef

**Ert tú áhugað/ur at verða partur av einum væl-samansjóðanum, jaligum starvsfólkabólki?**

## - So er tað tær vit hava tørv á.

Okkum tørvar ein námsfrøðing 30 tímar um vikuna, frá 15 apríl 2010. Ella eftir avtalu.

Sankta Jósefs barnagarður er ein sjálvsognarstovnur, íð hevur virkað í 78 ár. Á stovninum eru 17 starvsfólk.

Av hesum seytjan, hava 10 námsfrøðiliga útbúgving.

Barnatalið er 85, í aldrinum 3 – 7 ár.

**Vit vænta, at tú:**
- Ert væl fyri fakliga, og heldur teg kunnaðan innan menning á barnagarðsøkinum.
- Hevur hug og vilja at arbeiða við egnari fakligari menning og førleika.
- Ert fyrikomandi og hevur góð samstarvsevnir.
- Ert lagalig/ur, íðin, nærlagdur og álítandi.
- Kanst arbeiða sjálvstøðugt.
- Vísir virðing fyri børnum, foreldrum og starvsfelagnum.
- Er jalig/ur, og vísir gleði og áhuga í arbeiðinum.
- Dugir at síggja tørvin hjá tí einstaka barninum.
- Hevur gott yvirlit og megnar at skipa dagin.

Størvini eru lønt sambært Føroya Pedagogfelag og KAF í lønarstiga 11-18.

Ljóðar hetta áhugavert?

So send okkum eina skriftliga umsókn, saman við prógvi og viðmælum innan 27. mars 2010 til,

Sankta Josefs barnagarð.
Varðagøta 12.
100 Tórshavn.
sktjosef@olivant.fo

Meiri fæst at vita um størvini, við at venda sær til

Gunvá Egholm. Tlf. 312854/212851.

# Runavíkar kommuna

søkir eftir

## Pedagogi til Barnagarðin á Mýrunum

**Søkt verður eftir:**

- 1 pedagogi 30t um vikuna, til barnagarðstovu

**Førleikakrøv:**
vit sóknast eftir starvsfólki, ið eru nýhugsandi og ígongdsetandi og eru opin, jalig, duga at veita umsorgan og hava góð samstarvsevnir. Vit ynskja, at tú, í tøttum samstarvi við starvsfelagar og foreldur, kann skapa ein fjølbroyttan, mennandi og tryggan dag fyri hvørt einstakt barn.

**Vit bjóða tær:**
eitt spennandi starv við nógvum fjølbroyttum avbjóðingum í dagligdegnum, har tú blívur ein partur av okkara breiða starvsfólkahópi, har tað námsfrøðiliga arbeiðið verður raðfest høgt. Dentur verður lagdur á, at møguleiki er fyri fakligari og persónligari menning.

Starvið verður sett 1. apríl 2010 ella eftir nærri avtalu. Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Nærri fæst at vita um starvið við at tosa við Eyðnu Norðfoss, leiðara ella Jastrid Weihe, varaleiðara á tlf. 448254 ella 218254.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skal vera kommununi í hendi í seinasta lagi mánadagin 15. mars 2010, kl. 12.00.

**Runavíkar Kommuna**
Heiðavegur 26 · Postrúm 139
FO-610 Saltangará

Í Barnagarðurin á Mýrunum ganga 94 børn. Á stovninum eru 2 vøggustovur, 3 barnagarðsstovur og 1 stova til børn við serligum tørvi. Umstøðurnar á stovninum eru sera góðar við ljósum rúmligum stovum við eyka spælirúmi. Harumframt er verkstaður, sansirúm, samtalu/venjingarrúm og stórt felags/rørslurúm við barnavinarligum køki. Stovnurin liggur í vøkrum náttúrulendi beint við Toftavatn og nær við ítróttarøkið.

# ÚTLENDINGASTOVAN
IMMIGRATION OFFICE

## Tíðaravmarkað skrivstovustarv á Útlendingastovuni

Útlendingastovan søkir eftir avloysara fyri skrivstovufólk í barnsburðarfarloyvi. Starvstíðin verður frá 1. apríl 2010, ella skjótast gjørligt her eftir og til 1.mars 2011. Starvið er parttíðarstarv við starvsbrøki á 0,75.

**Um starvið :**
Høvuðsuppgávurnar verða :
- at hava um hendi alt vanligt skrivstovuarbeiði
- at passa telefon og avgreiða viðskiftafólk
- at føra journal
- at innheinta upplýsingar í samband við málsviðgerð

**Førleiki**
Umsøkjarin skal hava skrivstovuútbúgving ella aðra samsvarandi útbúgving ella royndir.

Umsøkjarin skal hava góð samstarvsevni, vera ábyrgdarfullur og røkin, kunna arbeiða sjálvstøðugt og hava áhuga í at royna nýggjar avbjóðingar. Umsøkjarin skal hava góðan málkunnleika í føroyskum, duga væl enskt og hava góðan telduførleika.

**Løn og setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum, c.v. og møguligum viðmælum skal sendast til:

Útlendingastovuna
Boks 220
N. Finsensgøta 10, 3 hædd
100 Tórshavn

Umsóknir skulu vera Útlendingastovuni í hendi í seinasta lagi 22. mars 2010.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Gurið Joensen, stjóra, á tlf. 357979.

**Um Útlendingastovuna** Útlendingastovan er stovnur undir Innlendismálaráðnum. Stovnurin gevur ummæli til danska Udlændingeservice uppá umsóknir um familjusamanføring og arbeiðs- og uppihaldsloyvi frá útlendingum, sum ynskja at koma til Føroyar. Útlendingastovan vegleiðir eisini um viðurskifti á útlendingaøkinum. Á stovninum eru 3 starvsfólk: stjórin, 1 málsviðgeri og 1 skrivstovufólk.

## Sethús á Glyvrum til leigu



Nærri upplýsingar á telefon 218408

**Glyvra Kirkjuráð**



# Aðalfundur

í Fornminnisfelagnum í Nes kommunu
verður leygardagin 20. mars 2010 kl. 16.00
í gamla prestagarði á Nesi.

***Nevndin***

## Nýggjar TANNPROTESUR

**Broytingar og umvælingar av gomlum protesum**

Kliniskur tannteknikari

Bergur á Reynatrøð

Opið er:
mánadag-hósdag frá kl. 9-16
fríggjadag frá kl. 9-12

Børkuvegur
620 Runavík
Tlf. 448480